# Kappkoyring í Vágsbotni?




**Er her talan um kappkoyring, har ein brandbilur kemur flúgvani av Vaglinum oman í Vágsbotn?**

Myndin er als ikki tilgjørd, men er tikin úr Tórsgøtu meðan ein bilur hjá sløkkiliðnum stóð uttan fyri Hotel Tórshavn Sjómansheimið í sambandi við eitthvørt arbeiði har. Aftan fyri forhjólini á bilinum eru tveir føtur settir niður á vegin fyri at stuðla bilinum, meðan arbeitt verður upp á bygningin. Tá verða forhjólini lyft upp frá.

Í tí ofta trongu ferðsluni í býnum kundu tey sum koyra við "útrykningi" nokk hugsað sær at kunna flogið upp um bilarnar, sum ikki halda inn til síðuna ella tarna teimum í aðrar mátar.

---

Føroya Ellisakfør:

# MC-boogie fyri tíggindu ferð




**Leygardagin 2. september 2006 skipar Føroya Ellisakfør fyri MC-boogie fyri tíggindu ferð síðan 1999. Tiltakið er fyri øll sum hava motorsúkklu og eru motorsúkkluáhugaði**

MC

Leygardagin 2. september skipar áhugafelagið Føroya Ellisakfør fyri

Tiltakið byrjar kl. 11.00 leygardagin yviri við Strond 22 í hølunum hjá Føroya Ellisakføum, har kaffi verður boðið. Kl. 12 verður farið norður eftir, har steðgað verður við Shellstøðina við Streymin í frá 12.45 – 13.15, tá koyrt verður til Klaksvíkar um Eiðisskarð. (tey sum ikki hætta sær tann vegin eru vælkomin at koyra gjøgnum Norðskálatunnilin). Væntandi verður komið til Klaksvíkar kl. 14.15, har MC-felagið í Klaksvík skipar fyri ábiti í Klingruni. Farið verður avstað aftur til Havnar kl. 16.

Um kvøldið kl. 19 verður veitsla í Kagganum, har tey sum ætla sær í veitsluna vera biðin um at tekna seg á telefon 223101. Kostnaðurin fyri veitsluna er kr. 300,-.

Ein av fyriskiparnum, Ove Ritter, sigur, at endamálið MC-Boogie er at savna motorsúkklukoyrarar og motorsúkkluáhugaði til eitt felags tiltak. Talan er als ikki um kappkoyring, men um væl skipaða koyring, har stórur dentur verður lagdur á skilakoyring og at ásettar koyrireglur verða hildnar. Hann vónar, at so nógv koma við sum gjørligt og bjóðar øllum motorsúkklukoyrarum vælkomnum.


• Umvæling av tryggingarskaðum og privat skaðum
• Vit umvæla øll bilmerki
• Klárgering til sýn
• Bremsur, útstoyt, stoytdoyvarar, rustarbeiði o.m.a.



Ring og fá eitt tilboð

**Sp/f Plátuverkstaðið**
Falkavegur · Tórshavn · Tel 321778 ella 221778
Teldupostur: plv@plv.fo



## Stásiligt ellisakfar til sølu




Bentley S II, árg. 1960 við V8 motori og automatiskum girum til sølu um hóskandi boð fæst.

Bilurin er væl útgjørdur og í sera góðum standi. Er væl egnaður til brúðarkoyring og onnur hátíðarlig endamál.

Áhugaði kunnu venda sær til

**Tel. 210877 ella 332877**



## Nissan Almera 1,6




Ein væl hildin Nissan Almera 1,6 til sølu vegna flyting.

Árg. des 1996, km. 168.000, sýnaður í des. 2005

Bilurin hevur 18" alu-felgur við nýggjum dekkum. Nýggj kavadekk á felgum fylgja við.

Prísur: kr. 45.000,-

**Tel. 216014 eftir kl. 17.00**